## Barca og Real vunnu

Tey bæði sponsku stórfeløgini, Barcelona og Real Madrid, vunnu bæði tryggar sigrar um vikuskiftið. Barcelona vann leygardagin 4-0 á Racing Santander við málum frá Iniesta, Henry, Marquez og Tiago skutu málini. Sunnudagin vann Real Madrid heili 6-2 á Villarreal. Ronaldo skoraði fyrsta málið, áðrenn Kaka økti undan steðginum. Og hóast Senna minkaði um munin, so var sigurin ongan tíð í vanda. Tvey mál frá Higuain, enn eitt frá Kaka og eitt frá Alonso vístu gestunum, hvar skápið skuldi standa, og so hjálpti lítið, at Nilmar fekk eitt einstakt mál fyri Villarreal.



## 5.000 kr. fyri at síggja Kessler

Talan er ikki um bílig atgongumerki, tá danski Mikkel Kessler skal boksa tað, sum líkist einum alt-ella-einki-dysti móti Carl Froch í sonevndu Super-Six. Dysturin verður boksaður í Herning, og fyri pláss við ringside, skulu áskoðararnir rinda 5.000 kr. fyri hvørt atgongumerki. Sølan av atgongumerkjum byrjaði í dag, og ert tú nøgd/ur við eitt pláss longur burtur frá ringinum, kunnu tey bíligastu atgongumerkini fáast fyri 600 kr.



### SÍ dovnaði í triðja

Fyrsta settið í finaluni var púra opið, tí frá byrjan til enda bylgjaði tað aftur og fram, uttan at nakað av liðunum slapp avgerandi frá hinum. Ta fyrstu løtuna var SÍ á odda 8-3, men skjótt hevði Mjølnir tikið tað mesta innaftur, og eftir skifti vóru klaksvíkingar á odda 16-15, áðrenn SÍ ímóti endanum royndist drúgvari og vann.

Hinvegin var eingin ivi í øðrum setti, tá SÍ mestsum beinanvegin fór avstað og helt munin á seks, sjey og enntá átta stigum. Servutrýstið hjá SÍ var gott, samstundis sum móttøkurnar hjá Mjølnir vóru tilsvarandi vánaligar, so tí peikaði nógv eina løtu á, at tað kundi gerast ein 3-0 sigur til SÍ. Hinvegin kom Mjølnir betur við ímóti endanum, so kanska fór tað heila ikki at verða avgjørt beinanvegin.

So var, tí teir í Mjølnir vildu tað nevniliga øðrvísi, tá teir í triðja setti struku avstað beinanvegin. Thorvald Danielsen servaði Mjølnir í gongd, og tí gjørdist settið mestsum ein spegilsmynd av øðrum setti, men við øvugtum fortekni. Her fekk SÍ einki at rigga, meðan tað koyrdi stak væl hjá Mjølnir.

Eftir niðurtúrin í triðja setti, komu menninir hjá SÍ væl fyri seg í fjórða setti, har teir struku avstað. Men mitt í settinum fekk Mjølnir fatur í teimum aftur og var um reppið at javna til 16-16. Men í staðin fór SÍ frá 16-15 upp á 18-15, og sást ikki meira til Mjølnir, ið mátti lúta fyri yvirmaktini, sum í SÍ gjørdist ein verdigur steypavinnari hjá monnum.

### Minti um aðalroynd

Ein orsøk til munin á liðunum í finaluni var, at Mjølnir tóktist vera heldur meira einstáttað í sínum spæli. Millum annað endaðu nógvar av servunum á Jóni Joensen, ið tó tók væl ímóti mestsum hvørja ferð, eins og hann mundi vera tann, ið mest gekk undan í álopsspælinum hjá SÍ.

Men eisini teir ungu sørvingarnir vístu, hvør dugur er í teimum. Fyrr í dystinum var Kári Mikkelsen væl við, og tá alt skuldi avgerast ímóti endanum á fjórða setti, vóru tað Emil Mikkelsen og Filip Gram, ið traðkaðu til og vístu vegin. Emil vann bóltarnar til 23-18 og 24-19, og Filip Gram risti ikki á hondunum, tá hann átti seinastu servurnar hjá SÍ, eins og hann ofraði seg á gólvinum at fáa seinasta bóltin uppaftur, so tað endaði við, at Boban Ilic høgdi til, men sendi bóltin útav – og SÍ var steypavinnari.

Samstundis sum hetta var steypafinalan, var hetta eisini eitt slag av aðalroynd til FM-finalurnar, har somu lið møtast aftur. Hvussu tað endar, ber bara til at gita um, men SÍ sær út til at vera sterkara liðið í løtuni, og tað kundi hent seg, at nokk so nógv hjá Mjølnir fer at avhanga av, hvussu nógv betri formurin hjá Jón Nielsen er blivin, tá tað kemur so langt. Hann vísti í løtum dygdir í finaluni, og verður hann uppaftur betur fyri, verður tað kanska meira spennandi í mars, enn tað var leygardagin.

**Gjøgnum allan dystin megnaðu sørvingar at leggja stórt trýst á Mjølnir, sum ongan tíð veruliga fekk fótað sær, tó at vunnu eitt sett**
Mynd: Álvur Haraldsen



## Tordu betur

Ein av ungu spælarunum hjá SÍ, Emil Mikkelsen, helt dirvi vera ein hin størsta munin á SÍ og Mjølnir í mansfinaluni leygardagin.

– Vit tordu betur at smasja og at sláa ígjøgnum, og tað var munurin. Men vit vóru bara betur, segði Emil, sum ikki tóktist heilt mettur, hóast hann fekk eitt gullheiðursmerki um hálsin

– Eg rokni við, at nú taka vit eisini føroyameistaraheitið, um tað tá gongur líka væl sum í dag. Vit vóru kanska eitt sindur merktir av nervum ta fyrstu løtuna í dag, men í endanum var tað eingin trupulleiki.

-eij

## SÍ var betra liðið

Undan steypafinaluni hjá monnunum vakti tað ans, at ein gamal SÍ-arin, Jón Nielsen, var at síggja millum spælararnar hjá Mjølnir. Men hóast hann kundi fingið allar hinar sørvingarnar ímóti sær, hevði hann onga ringa upplivilsi í ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin.

– Tað er altíð stuttligt at spæla steypafinalu, tí tað eru so øgiliga nógvir áskoðarar. Allir áskoðararnir vóru eisini fínir, og eg hoyrdi einki róp ella nakað eftir mær, fyri tað um eg spældi við Mjølnir ímóti SÍ, segði Jón eftir finaluna.

– Men sjálvt um tað er veldugt at spæla eina finalu, tá karmarnir eru so góðir, so er tað altíð keðiligt at tapa. Men SÍ var betra liðið í dag, so har var ikki nógv hjá okkum at gera við tað.

Jón Nielsen ofraði seg fyri sakini, hóast tað var sínum bygdarmonnum, hann spældi ímóti. Ta einu ferðina leyp hann upp um girðingina og niðan millum áskoðararnar eftir einum bólti, og eina aðru ferði var hann so íðin at fara aftur eftir einum vilstum bólti, at hann rendi knøini í gronina á einum Ford Focus.

– Tað kundi farið illa við knøunum hjá mær, og eg veit heldur ikki, hví teir stilla bilar inni í einari ítróttarhøll, segði Jón, áðrenn vit mintu hann á, at hann altso hevur spælt fleiri steypafinalur síðstu 12-15 árini og átti at vitað, at har standa altso nakrir bilar:

– Jú, jú, men so kundi hasin bilurin staðið eitt sindur longur afturi ella onkra aðrastaðni.

hil